MIÐLASTUÐULSNEVNDIN

Sirið Stenberg
Landsstýriskvinna í Almanna- og mentamálum

12. desember 2024

*Frágreiðing um virksemi hjá Miðlastuðulsnevndini í 2024*

# Miðlastuðul latin 25 verkætlanum og sjey miðlum í 2024

Sambært § 7, stk. 3, í miðlastuðulslógini skal Miðlastuðulsnevndin við árslok á hvørjum ári lata landsstýrisfólkinum hesa skrivligu frágreiðing um virksemi sítt. Landsstýrisfólkið leggur frágreiðingina alment fram á netið.

2,9 milliónir krónur vóru settar av á fíggjarlógini fyri 2024 til miðlastuðul. Miðlastuðulsnevndin hevur latið 25 verkætlanum og sjey miðlum hendan stuðul. Stuðulin er latin sum verkætlanarstuðul og sum stuðul til skjalprógvaðar lønarútreiðslur.

Verkætlanarstuðul kann verða latin til miðlar, ið leggja seg eftir at gera loftborið ella skrivligt tilfar, sum verður mett at hava journalistiska dygd og samfelagsligt virði. Talan kann vera um eitt nú greinarøð, heimildarsending, poddvarp o.a.

Stuðul til lønarútreiðslur kann verða latin til miðlar, sum hava skjalprógvaðar lønarútreiðslur undanfarna roknskaparár.

Sambært miðlastuðulslógini verða 70 % av játtanini latnar til verkætlanir og 30 % til lønarstuðul. Í krónum skuldi sostatt latast kr. 2.030.000 til verkætlanir og kr. 870.000 til skjalprógvaðar lønarútreiðslur.

## Stuðul til verkætlanir

Miðlastuðulsnevndin tók á fundi 13. november 2024 endaliga avgerð um at játta fimm miðlum stuðul til 25 miðlaverkætlanir.

Tilsamans vórðu 80 umsóknir latnar inn.

Umsóknirnar vórðu mettar út frá journalistiskari dygd og samfelagsligum virði. Miðlar við ábyrgdarhavandi redaktøri, og sum fevna um eitt breitt evnisøki og hava ein regluligan tíðindastreym, kundu søkja um miðlastuðul.
Miðlastuðulsnevndin legði ítøkiliga dent á trý parametur í viðgerðini: Innihald/hugskot, kostnað og útbúgving/royndir hjá viðkomandi journalisti ella toymi. Grundað á hesi viðurskifti og endamálið við miðlastuðulslógini annars, gjørdi nevndin eina heildarmeting av øllum innkomnu umsóknunum og játtaði stuðul til 25 av verkætlanunum.

Mannagongdin var tann, at helvtin av játtanini varð útgoldin beinanvegin, tó treytað av at miðilin ikki hevur verkætlanir frá undanfarnum árum, sum ikki eru avgreiddar. Hin helvtin av

játtanini ella samlaða játtanin verður rindað, tá ið framleiðslan er liðug og Miðlastuðulsnevndin hevur góðkent verkætlanina.

Hesar verkætlanir fingu stuðul í 2024:

| Heiti | Miðil | Játtan tilsamans |
|---|---|---|
| Føroyskir vinnulívsleiðarar í Danmark | Dimmalætting | 55.000,00 kr |
| Krabbamein | Dimmalætting | 40.000,00 kr |
| Serskøltar | Dimmalætting | 52.800,00 kr |
| Tingarbeiðið | Dimmalætting | 125.000,00 kr |
| Útlendingar og rasisma | Dimmalætting | 42.000,00 kr |
| 72 almennir stovnar stýra Føroyar | Dimmalætting | 81.000,00 kr |
| Aktuelt 2024 | Dimmalætting | 100.000,00 kr |
| Fast Track skipanin | FM1 | 30.000,00 kr |
| FAS skipanin | FM1 | 30.000,00 kr |
| Skúlabørn - skúlaaftran | FM1 | 30.000,00 kr |
| Vitlíki | FM1 | 30.000,00 kr |
| Kjallarafyritøkur - Íverksetan | FM1 | 125.000,00 kr |
| Borgarstjórar | Sosialurin | 164.160,00 kr |
| Umborð | Sosialurin | 92.400,00 kr |
| Til arbeiðis | Sosialurin | 143.200,00 kr |
| Bøndur | Sosialurin | 197.120,00 kr |
| Eldralív | Sosialurin | 63.840,00 kr |
| Minnisvarðar | Sosialurin | 88.920,00 kr |
| Seinastu útróðrarmenninir | Sosialurin | 86.240,00 kr |
| Føroyski báturin | Sosialurin | 54.720,00 kr |
| Bilurin hesa vikuna. Lýsa serliga bilar sum ellisakfør og specialbilar | Sosialurin | 91.200,00 kr |
| Ferðast kring Føroyar við børnum | Sosialurin | 73.920,00 kr |
| Bústaðarmarknað | R7 | 75.048,00 kr |
| Verjan | Portal.fo | 75.000,00 kr |

| | | |
|---|---|---|
| Føroyskar havnir | Portal.fo | 65.000,00 kr |
| | | 2.011.568,00 kr |

**Stuðul til skjalprógvaðar lønarútreiðslur**

Á fundi 22. oktober 2024 tók Miðlastuðulsnevndin endaliga avgerð um játtan av miðlastuðli til skjalprógvaðar lønarútreiðslur. Játtanin til hendan stuðul var tilsamans kr. 870.000.

Níggju miðlar søktu um hendan miðlastuðulin. Ein miðil kundi ikki vísa á skjalprógvaðar lønarútreiðslur fyri undanfarna roknskaparár, ið sambært lógini skal vera útrokningargrundarlagið fyri hendan miðlastuðul. Ein miðil varð mettur at hava slíkt tilknýti til ein annan miðil, at miðlarnir ikki kundu metast sum verandi sínámillum sjálvstøðugir, ið er ein treyt fyri at fáa játtað miðlastuðul. Hesar umsóknir vórðu tí noktaðar.

Sjey miðlar luku treytirnar. Miðlastuðulsnevndin kundi síðani staðfesta, at ein miðil fór um markið fyri, hvussu nógv ein einstakur miðil ella eitt miðlasamtak kann móttaka í stuðli – eitt mark, ið miðlastuðulslógin ásetir til 40 % av teimum kr. 870.000. Stuðulin til hendan miðil varð tí settur niður, og býtið millum miðlarnar varð hareftir hetta:

| *Miðil* | *Upphædd (kr.)* |
|---|---:|
| Knassar | 234.869,72 |
| Eysturoyarportalurin | 32.067,06 |
| JN.fo | 6.158,07 |
| Rás 2 | 22.776,71 |
| Netavísin VP | 62.603,31 |
| FM1 | 163.525,14 |
| Sosialurin | 348.000,00 |
| *Tilsamans* | *870.000,00* |

**Komandi ár**

Landsstýrið hevur í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2025 skotið upp at lata somu játtan til miðlastuðul komandi ár.
Lagt er tó upp til ein broyttan stuðulsleist. Almanna- og mentamálaráðið hevur boðað fíggjarnevndini hjá Løgtinginum frá, at eitt lógaruppskot er fyrireikað. Sagt verður, at semja er millum umboðini fyri samgonguflokkarnar í miðlamálum um at 30% av játtanini frameftir fer til rakstur, og 70% av játtanini fer til íverksetan, t.e. at seta á stovn nýggjar miðlar. Somuleiðis fær forfólkið við broytingunum ætlandi heimild til at avgreiða smærri mál s.s. áheitanir um innlit og at svara fyrispurningum uttan at kalla alla nevndina saman fyri at tryggja viðtøkuføri í avgerðarmálum.

12. desember 2024

Vegna Miðlastuðulsnevndina
Janus Haraldsen, formaður